

## Havsbrún 57 milliónir krónur í yvirskoti

Árið í fjør royndist væl hjá P/F Havsbrún í Fuglafirði, hvørs høvuðsvirksemi er framleiðsla av fiskamjøli, fiskalýsi og fiskafóðuri. Ársúrslitið fyri 2008 líkist kortini nógv úrslitinum tey bæði árini frammanundan. Í 2007 hevði felagið eitt yvirskot upp á góðar 55 milliónur krónur. Í 2006 hevði felagið góðar 57 milliónir í yvirskoti, meðan felagið í 2005 hevði eitt hall upp á slakar fimm milliónir krónur. Samlaða ognin hjá felagnum er nú slakar 420 milliónur krónur, meðan eginpeningurin er góðar 283 milliónur krónur. Umframt høvuðsvirksemi hjá Havsbrún, so hevur felagið eisini dótturfeløg, sum framleiða aldan laks og síl. Framleiðslan verður seld bæði innanlands og uttanlands. Eigararnir í P/F Havsbrún fingu 15 milliónir krónur í vinningsbýti, meðan stjórn og nevnd fingu 2,5 milliónir krónur í samsýning. Árini frammanundan var hesin postur sundurgreinaður, og tá fekk stjórin, Bergur Poulsen 1.797.000 krónur í løn, meðan nevndarlimirnir tilsamans fingu 605.000 krónur.

# Ingeborg farin undir sína seinastu vakt

**Um vikuskiftið varð Ingeborg Vinther afturvald til forkvinnu í Føroya Arbeiðarafelag, men hon gjørdi púra greitt, at hetta er seinastu ferð, at hon stillar upp**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ingeborg Vinther fer nú undir sítt seinasta skeið, sum forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Tað er greitt, eftir aðalfundin í felagnum um vikuskiftið.

Um vikuskiftið hevur Føroya Arbeiðarafelag havt aðalfund og har var hon afturvald til forkvinnu við fullari undirtøku.

Men eftir valið takkaði hon fyri álitið og gjørdi samstundis greitt, at hetta er seinastu ferð, at hon stillar upp.

- Tá ið hetta valskeiðið er lokið, fari eg at taka meg úr øllum fakfelagsarbeiði, fortaldi Ingeborg Vinther fundarfólkinum.

Hvørt valskeið er tvey ár og sostatt er tað greitt, at á vári 2011 skal Føroya Arbeiðarafelag hava nýggjan formann.

Annars vóru Karla Einarsson og Jógvan Páll Johansen afturvald í nevndina. Seinast nevndi var eykalimur, men tók sæti í nevndini sum fastur limur herfyri, eftir at Tummas Juul Festirstein segði seg frá.

Hinir nevndarlimirnir eru Georg Hansen, næstformaður, Sunrid Vang Margretha Rasmussen og Agnar Olsen.

Fyrsti tiltakslimur er Elin Sørensen og annar tiltakslimur er Maud Túgvustein og triði tiltakslimur er Christian Joensen.

### Tíð at gevast

Ingeborg Vinther sigur, at upp undir aðalfundin hesuferð hevði hon leingi hugsað um at leggja frá sær.

Men hon kom kortini til ta niðurstøðu, at hon skuldi bjóða seg fram í eitt valskeið afturat.

- Men hetta verður so heilt avgjørt seinastu ferð, at eg stilli upp til formann í Føroya Arbeiðarafelag.

Tá ið hetta valskeiðið er av um tvey ár, verið eg næstan 66 ár og tá er tíð at gevast, sigur hon.

Ingeborg Vinther sigur, at Føroya Arbeiðarafelag er akkurát í holt við umfatandi umbyggingar í felagshúsinum í Stoffalág og tí heldur hon, at tað er óheppið, at hon leggur frá sær nú.

Ingeborg Winther bleiv forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag á vári í 1980 og hon hevur sostatt staðið á odda fyri landsins største arbeiðarafelag í heili 29 ár. Og tá ið hon leggur frá sær um tvey ár, hevur hon verið forkvinna í heili 31 ár.

Men áðrenn hon varð forkvinna, hevði hon verið nevndarlimur í trý ár.



*Ingeborg Vinther er afturvald sum forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, men hon hevur gjørt greitt, at tá ið hetta valskeiðið er úti um tvey ár, tekur hon seg úr øllum fakfelagsarbeiði*

# Fløgvøllurin skal vera liðugur um góð tvey ár

**Nevndin í P/F Vága Floghavn hevur tikið avgerð um, at bæði ráðgevara- og byggiuppgávurnar í samband við leinging av flogvøllinum í Vágum og útbygging av terminalinum skulu bjóðast út í fríari kapping í Føroyum og uttanlands**

FLOGVØLLUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



Nevndin í P/F Vága Floghavn hevur somuleiðis tikið avgerð um at býta samlaðu verkætlanina sundur soleiðis, at arbeiðið við leinging av lendingarbreytini og víðkan av trygdarøkinum og útbygging av terminalinum verða framd hvør sær. Arbeiðið við leinging av lendingarbreytini og víðkan av trygdarøkinum verður sett í verk fyrst, meðan arbeiðið við útbygging av terminalinum verður sett í gongd seinni, hetta soleiðis, at tey størru flogføruni, sum ætlanir eru um í framtíðini skulu flýgva til Føroyar, kunnu lenda.

Útboðið av uppgávuni at gera projektuppskot, forprojekt og detailprojekt viðvíkjandi leinging av lendingarbreytini og víðkan av trygdarøkinum á flogvøllinum í Vágum bleiv lýst almennt leygardagin tann 28. mars 2009. Útboðið av projekteringsarbeiðinum verður lýst alment bæði í Føroyum, Danmark, Noregi og Íslandi.

Útboðið av projekteringsuppgávuni fevnir um seks alternativar loysnir, sum nevndin seinni skal velja ímillum tá ið meira nágreiniligar kostnaðarmetingar og metingar av flogtekniskum viðurskiftum fyriliggja.

**Hesar eru:**

1. Leinging av vølli til 1600 metrar og víðkan av trygdarøki norðanfyri vøllin frá 75 metrum til 150 metrar

2. Leinging av vølli til 1600 metrar og víðkan av trygdarøki sunnanfyri vøllin frá 75 metrum til 150 metrar

3. Leinging av vølli til 1600 metrar og víðkan av trygdarøki á báðum síðum av vøllinum frá 75 metrum til 150 metrar

4. Leinging av vølli til 1799 metrar og víðkan av trygdarøki norðanfyri vøllin frá 75 metrum til 150 metrar

5. Leinging av vølli til 1799 metrar og víðkan av trygdarøki sunnanfyri vøllin frá 75 metrum til 150 metrar

6. Leinging av vølli til 1799 metrar og víðkan av trygdarøki á báðum síðum av vøllinum frá 75 metrum til 150 metrar

Freistin at lata inn boð uppá projekteringsuppgávuna er sett til 11. mai 2009.

- P/F Vága Floghavn hevur stórar vónir um, at tað, at bjóða eina slíka uppgávu út í fríari kapping í og uttan fyri Føroyar, bæði fíggjarliga og hvat tekniskum loysnum viðvíkir, fer at verða til fyrimuns fyri felagið og harvið tey, ið nýta flogvøllin. Miðjað verður eftir, at projekteringsráðgevin verður valdur áðrenn endan av mai 2009, og at projekteringsarbeiðið og útboð av byggiuppgávuni verður liðugt miðskeiðis í decembur 2009, soleiðis at byggifyritøka kann veljast umleiði ársskifti 2009/10.

Miðað verður framvegis ímóti, at longdi flogvøllurin stendur liðugur miðskeiðis í 2011, sigur Kitty May Ellefsen, forkvinna í Vága Floghavn.